## VIÐMERKINGAR

# riddarakrossur?



*teimum frá, at tjóðin tekur sína uppgávu í fullum álvara, sum ájavnur partur av heimssamfelagnum. Tað gerst bara ígjøgnum føroyska statin. Republikkina. Frægasti kendi stjórnarformur, sum higartil finst, sum karmur um viðurskiftini hjá eini tjóð, bæði úteftir og inneftir, sigur Tórbjørn Jacobsen*

út úr donsku lívmóðrini. Høgna hóvar sjálvandi ikki nýkomnu støðuna, tað verður yvir hansara lík og floksins, at kolonistøðan verður formelt knæsett í altjóða samfelagnum. Eitt afturstig, sum ongin rættskikkaður republikanari kann taka undir við. Tað vistu vit eisini frammanundan. Tí tykiskt tað ørkymlandi, at bara hendan kenda og klassiska stríðsásin skuldi gerast meginfeltið í tíðindaflutninginum um hetta viðbrekna mál.

> »*Nú roykurin frá seinasta attentatinum er sogin út í atmosferuna, og krútroykurin ikki fjalir veruleikan, verður neyðugt hjá Djurholm at gera eitt nýtt stunt um mánaðarskiftið komandi. At royna fólksins naivitet einaferð enn. Hvør uppdiktaði attentatmaðurin verður í hesi syftu, er ikki gott at vita, men ongin ivast í, at mikrofonstativini uppi í Sortudýki longu standa til at bresta av berum spenningi…*«

Hvar er Fólkaflokkurin, Radikalt Sjálvstýrið, vorðin av í øllum meldrinum?

Fyri sjálvstýrisfólkið í Føroyum er tað hann, sum er avgerandi parturin í tí, ið nú hendir, ella ikki hendir, í føroyskum sjálvstýrisstríði. Ikki hoyggjaríið og ósemjurnar hjá Eidesgaard og Hoydal. Kallsberg kagaði undan hjalsvegginum eina løtu í tjaksendingunum, men tað var týðuligt, at hann ikki so frætt sum hevði lisið donsku fráboðanina, sum hann sjálvur hevur atkvøtt ígjøgnum á Føroya Løgtingi, og sum nú er endað sum altjóða staðfesting um okkara avmarkingar í millumtjóða samstarvi. Táið hann so royndi seg við fintuni um, hvussu stóra ávirkan hann hevði á danskan politikk sum fólkatingsmaður, fekk Hoydal sjálvandi ikki hildið sær, hann fekk láturkrampa. Hostaði sum ein nikotinurga. Standandi skemtisøgan á Christiansborg er jú, at ein fólkatingsmaður í konservativa tingbólkinum nú ein dagin, eitt ár eftir valið, spurdi ein av norðuratlantisku mandatunum eftir, nær Lisbeth L. Petersen mundi fara at vísa seg aftur á Danatingi, um nakað álvarsligt mundi vera hent henni, nú hon ikki hevði verið at sæð harniðri soleingi. Táið hann fekk at vita veruligu søguna, og at viðkomandi sum var valdur, fyri ári síðani, var limur í hansara egna tingbólki, mundi sarkastiski láturin ongan endan fingið. Hann kundi bara taka undir við Finnboga Ísakson, sála, sum einaferð skrivaði, at fólkatingsmenninir hjá Fólkaflokkinum ikki tíma at møta á Fólkatingi fyrrenn skrivstovudamurnar ringja og boða frá, at postkassarnar eru so á tremur við pappírum, at teir noyðast at gera ein svipptúr til ríkisins metropol, um ikki annað, so fyri at sortera í pappírsrúgvunum. Lítil hjálp er eisini at heinta í donskum skrivara, sum ikki skilir føroyska málið.

> »*Danir eru heimsmeistarar í imperialismu. Høvdu ikki áneyðir at samráðast um hvørki yvirtøkulóg ella uttanríkispolitiskar heimildir. Serveraðu alt á einum fati, spældu hund við Eidesgaard niðri í Keypmannahavn…*«

Danir eru heimsmeistarar í imperialismu. Høvdu ikki áneyðir at samráðast um hvørki yvirtøkulóg ella uttanríkispolitiskar heimildir. Serveraðu alt á einum fati, spældu hund við Eidesgaard niðri í Keypmannahavn og trýstu hann og samgonguna, harvið eisini Fólkaflokkin, at atkvøðu fólkatingslógirnar ígjøgnum á Føroya Løgtingi, og tá var hundurin ikki bara hálvbardur, hann var avbardur. Anfinn Kallsberg segði, at hetta var hansara lívsverk, sum nú var vorðið veruleiki. Samstundis bedýraði hann, sjálvandi fyri at kyrra hin meira revolutionera veingin í flokkinum, at føroyska uppskotið og føroysku viðmerkingarnar vóru allur sannleikin í hesum álvaramáli. Sjálvandi ignoreraðu danir hendan glantrileikin hjá radikalu sjálvstýrarunum totalt. Hvat skuldu teir brúka hetta fjantið til, sum bara var ætlað illtonktum fólkaflokksmonnum, soleiðis at teir ikki í ovursinni skuldu leypa framav. Teir høvdu fingið tað teir ætlaðu og skuldu, og í bráðskundi boðaðu teir Coffi Annan frá, at m. a. Fólkaflokkurin endaliga hevði givin skarvin yvir í føroyskum sjálvstýrisstrevi, meira enn hundrað ár eftir, at tað kyknaði av álvara.

Fyri valdsins sakir, í hesi postkolonialu donsku kommunuskipanini, valdu teir tjóðskaparliga yvirgeving, fyri at halda fast um treytaleysa tamarhaldið á Jóannesi í heimliga politikkinum. Tað er sjálvandi eitt val. Sum serliga skal gagna sterku lobby'ini kring politiska hierarkiið í flokkinum, og tað er meira umráðandi nú enn nakrantíð, táið almennu ognirnar í komandi tíð skula flytast úr almennum yvir í privatan eigaraskap.

Setursfrøðingurin, Jógvan Mørkøre, heldur, at vælkenda definitiónin, um hvussu politiska skipanin er samanskrúvað, har ásarnir ganga tvívegis, og ongin hevur ivast í tjóðskaparliga blokkinum, er farin úr spónalagnum. Fólkaflokkurin er lopin frá og hevur nú lagt seg í heimastýrisleguna. Tjóðveldisflokkurin stendur einsamallur, sum garantur fyri føroyskum fullveldi. Hendan tulkingin er ikki av leið, og tey flestu, eisini fólkafloksveljarar, munna vera samdir við honum í hesi meting. Miðvísa strevið hjá Bjarna og Óla sigraði umsíður. Ríkisfraktiónin eigur valdið, nú hanga Poul & Co. bara uppi í. Men teir hava framvegis ein møguleika fyri at prógva, um nøkur knota er eftir, táið uppskotið hjá Tjóðveldisflokkinum, um í skundi at boða ST frá, at vit ikki eru partur av, tiansheldur taka undir við, donsku fráboðanini, kemur fyri á Tingi í næstum. Edmund er ikki hugaður fyri at seta Tingið fyri ásettu tíðina, og Fólkaflokkurin er ikki ressaður, harvið mega vit í ótolni bíða eftir viðgerðini av hesum fyri tjóðina lívsneyðuga uppskoti.

Nú roykurin frá seinasta attentatinum er sogin út í atmosferuna, og krútroykurin ikki fjalir veruleikan, verður neyðugt hjá Djurholm at gera eitt nýtt stunt um mánaðarskiftið komandi. At royna fólksins naivitet einaferð enn. Hvør uppdiktaði attentatmaðurin verður í hesi syftu, er ikki gott at vita, men ongin ivast í, at mikrofonstativini uppi í Sortudýki longu standa til at bresta av berum spenningi. Knæsetingin av kolonistøðu Føroya skal ikki gravast uppaftur og broytast. Tað verða teir og Bjarni garantarnir fyri.

Onkur helt fyri, at so at siga onki mennandi var komið út úr sokallaða Sethúsinum, tilhaldið hjá Vinnumálaráðnum, síðani Brockie tókst við grísahald í kjallaranum - eitt skiftið undir seinra heimsstríði. Viðkomandi helt fyri, at meira hóskandi hevði verið, um Bjarni og øll hansara umsiting fluttu vesturum, í Skibsted Pakkhúsið, sum havnarmenn plagdu at rópa Vaðskítaneystið. Har kundi hann so sitið í friði og náðum og gartera við sínum vátu kinesarum. Teir geva eisini nakað av royki, og tørvur verður á honum, táið tjóðveldisuppskotið um at halda fast um tjóðarinnar virðir og rættindi, kemur fyri í tí, sum nøkur framvegis halda vera evsta vald landsins. Eftir næsta pseudo-attentatið má roknast við, at felagsmóttøkan verður flutt úr Vektarbúðini niður á Christiansborg, tástaðni er hon í líka góðum hondum sum sjálvstýrismálið. Fall Fólkafloksins er ófatiligt fyri okkum, sum kenna skismaði ímillum veljara og flokk. Harfyri eigur ongin at missa mótið, Tjóðveldisflokkurin letur seg ongantíð dragsa út av fullveldisbásinum, heldur ikki nú hann stendur einsamallur eftir í tí sferuni av føroyskum politikki.

Riddarakrossarnir, hasi donsku leikapettini, gjørdust føroyingum eitt dýrt fornoyilsi. Ein heil tjóð rillar av hesum imperialistiska bringuprýði, hetta má fáa avleiðingar, og teimum ræður einans fólkið fyri, táið Jóannes um skamma stund fer at leggja kongin. Politiskt vacuum fremur onki. Dregur bara frá í mun til heimin annars. Stundin er komin til politiskt systemskiftið. At royta donsku tinglýsingina útaftur úr arkivunum í ST stjórnarskrivstovunum, fyri síðani at boða teimum frá, at tjóðin tekur sína uppgávu í fullum álvara, sum ájavnur partur av heimssamfelagnum. Tað gerst bara ígjøgnum føroyska statin. Republikkina. Frægasti kendi stjórnarformur, sum higartil finst, sum karmur um viðurskiftini hjá eini tjóð, bæði úteftir og inneftir.

*torbjornj@logting.fo*